# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Ungir dreingir kunnu vænta stóra rokning

**Bæði løgreglan og Sjóbjargingarstøðin máttu til verka í morgun, og tað fer at kosta teimum ungu dreingjunum dýrt**

LØGREGLAN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ein býtúrur í Havn hjá nøkrum ungum drongjum, fer helst at enda við eini stórari rokning.

Tað var beint eftir klokkan átta í morgun, at fólk Yviri við Strond boðaði løgregluni frá, at ein gummibátur rak í Nólsoyarfirði við fólki umborð og at tað sá út til, at motorurin var steðgaður.

Løgreglan fór at kanna málið og tá ið ongin ivingur var um, at báturin hevði maskinbrek, varð Skóbjargingarstøðin fráboðað, so at hon kundi bjarga monnunum.

Men so hendir tað, at ein skjóttgangandi bátur við einum manni kemur úr Havn og fer út til gummibátin og tekur teir báðar dreingirnar í gummibátinum upp, sigur løgreglan.

Men tað løgna var, at teir lótu gummibátin liggja eftir í Nólsoyarfirði og tað fekk ávaringarklokkurnar hjá løgregluni at blinka, tí her ruggaði ikki rætt.

– Vit syrgdu fyri at standa fyri tí skjóttgangandi bátinum, tá ið hann kom til lands og vit handtóku so allar tríggjar dreingirnar.

Tað vísti seg, at teir høvdu stolið gummibátin, tí lótu teir hann liggja í Nólsoyarfirði.

Samstundis sendi Sjóbjargingarstøðin bát út eftir gummibátinum so at eigarin fekk hann aftur, men eisini so at ongin annar skuldi boðað frá, at bátur rak manntómur á sjónum, so at óneyðug leiting varð sett í verk.

Teir tríggir drongirnir vóru til avhoyringar í morgin og teir verða skuldsettir fyri stuldur og tað fáa teir bót fyri.

Men Løgreglan sigur, at teir kunnu eisini vænta sær eina stóra rokning fyri at hava elvt til, at Sjóbjargingarstøðin mátti út eftir bátinum.




*Løgreglan mátti í morgun eftir trimum ungum dreingjum, sum afturfyri kunnu vænta sær eina trivaliga rokning*





Starv í Kaupthing Bank

Í sambandi við at virksemi okkara er munandi vaksið seinastu tíðina, sóknast vit eftir fólki til umsitingardeild okkara.

Við tilvísing til leiðaran á umsitingardeildini kemur tú at fáast við handfaran av skjalagongd í sambandi við virðisbrævahandlar, uttanlandssamskifti, alt vanligt bankavirksemi annars og aðrar fyrifallandi uppgávur.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi og hevur eitt positivt lyndi. Vit leggja stóran dent á, at okkara starvsfólk eru útvend og løtt at samstarva við.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv í einum livandi felagi, sum støðugt mennist.

Millum starvsfólkini valdar ein góður samstarvsandi í einum spennandi og mennandi umhvørvi.

Hevur tú okkurt at spyrja um í samband við starvið í Kaupthing Bank, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Regin I. Jakobsen, umsitingarstjóra, á telefon 351510 / 551510 ella telduposti regin@kaupthing.fo.
Til ber eisini at søkja starvið umvegis heimasíðuna.
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. juli 2007.

Kaupthing Bank
Bókbindaragøta 8
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn
www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK

STARVSLÝSING

Maskinlærlingur [endurlýsing]

Søkt verður eftir dugnaligum og álítandi maskinlærlingi til maskinmiðstøðina í Kollafirði at byrja eftir summarfrítíðina.

Maskinmiðstøðin hevur um hendi viðlíkahald av entreprenørmaskinum hjá Landsverki og høvuðsgoymslu av eykalutum og amboðum, herundir innkeyp og viðlíkahald av hesum.

Arbeiðsuppgávur
Arbeiðið fevnir um viðlíkahald og umvæling av maskinum o.ø. hjá stovninum. Neyðugt er at hava vanligt koyrikort.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars verða sambært lærlingasáttmálanum millum Føroya Handverkarafelag & Landsfelag Handverkanna og Føroya Arbeiðsgevarafelag & Føroya Handverksmeistarafelag. Lærutíðin er 4 ár og endar við eini sveinaroynd.

Umsóknir
Umsóknir skulu sendast til lv@lv.fo ella:

Landsverk,
Postsmoga 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. august, 2007. Merk umsóknina „Umsókn maskinlærlingur" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jóan Petur Patursson, rakstrarleiðara, á tlf. 540 950 ella Johan Hansen, smiðjumeistara, á tlf. 540 951.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*